ÍBÚÐ/KAMAR SØKIST
20 ára gamal drongur søkir íbúð ella kamar. Eri friðarligur, fari væl um og gjaldi tilháva.
Tlf. 506407, Jógvan

ÍBÚÐ SØKIST
Par við 2 børnum søkja íbúð í Havn. Má hava 2 kømur. Roykja og drekka ikki og gjalda altið til tíðina.
Tlf. 320624 ella 251316

BÓLKURIN »ZINK«
søkir eftir venjingarhøli í Havn ella nær við Havnina. Prísurin skal hægst vera 2.000,- um mánaðin. Hølið skal minst vera 15 fermetrar.
Tlf. 265143

LEIGA ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Familja, ikki-roykjarar, vil fegin leiga eina íbúð í dagunum 19.-26. apríl. Alt hevur áhuga.
Tlf. 316099/216099

KAMAR ELLA ÍBÚÐ YNSKIST!
Trúgvandi drongur søkir eftir einari íbúð ella kamari við øllum hentleikum, skjótast gjørligt í Tórshavn. Í miðbýnum hevði verið best.
Ring til mín á tlf. 253023

ÍBÚÐ YNSKIST
25 ára gomul genta søkir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Eri álitandi, farið væl um og gjaldi til tíðina. Alt hevur áhuga.
Vinarliga ring 313959 ella 210250

VIT HAVA
eini góð hús (rekkjuhús) standandi í J. Paturssonargotu. Húsini eru bygd í 1974. Tey eru í 3 hæddum. Kjallarin er ónnrættaður. Miðhæddin hevur vindfang, lítið wc, gongd við trappu upp á loft og trappu niður í kjallaran, stovu, spísistovu og køk. Loftið er innrættað við gongd, baðiverilsi, 3 kømur og 1 hjúnarúm. Hvør hæddin er 62 fermetrar, kjallarin er tó eitt sindur minni. Niðanfyri húsini er ein stórur hjallur. Vit ynskja okkum: Eini vælhildin sethús við tilhoyrandi íbúð av tí, at vit eru tvær familjur undir sama taki. Hevur hetta áhuga, skriva til Sosialin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 561

HÚS Í KLAKSVÍK
Eigara íbúð Undir Klakki 9.b til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 456622 og 756622

ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKIST
til leigu í Norðoyggjum frá 1. mai. Max. 3.000 kr. um mánaðin við hita og el. Royki ikki, ongi húsdjór, fari væl um og gjaldi til tíðina.
Vinarliga ringið 458028

HÚS Í VÁGI TIL SØLU
um hóskandi boð fæst.
Tlf. 373211 ella 213978

ER TAÐ NAKAR
ið hevur eina størri íbúð/hús til leigu/framleigu í Keypmannahavn í tíðarskeiðinum sept. 2003 til júl 2004, so ringið á
tlf. 316941 ella 224570

ÍBÚÐ Í KBH YNSKIST
Genta søkir 1-2 ver. íbúð í KBH. umráðnum, andeil ella til leigu.
Tlf. +45 21946615

ÍBÚÐ SØKIST
Ungur maður, ið hvørki roykir ella drekkur og við føstum starvi søkir íbúð, max. 4.000 kr. um mánaðin.
Tlf. 250552

ÍBÚÐ YNSKIST
Par við 2 børnum søkja íbúð í Havn. Má hava minst 2 kømur. Roykja og drekka ikki. Prísuppskot uml. 5.000 kr.
Tlf. 320624 ella 229951

ÍBÚÐARNEYÐ
Eg havi onki at búgva í eftir 1. juli. Er tað nakar sum hevur eina íbúð.
Tlf. 322416

LÍTIL HÚS YNSKJAST
Er tað nakar sum hevur eini lítil hús á Ternuryggi ella Hoyvík til sølu.
Tlf. 322416 og 222416

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð ynskist til leigu í miðstaðarøkinum frá 1. august.
Tlf. 221068

FAR EIN TÚR TIL VIÐAREIDIS
og uppliv hina vakrastu náttúruna í landinum. Fá tær innivist í hugnaliga húsinum „Fyri Eystan Lið". Húsið hevur allar hentleikar.
Ring 455777 ella 215777

ÍBÚÐ ELLA HÚS
í Tórshavn, Klaksvík ella Runavík ynskist til leigu, frá 1. sept. 2003. Vit eru eini hjún, við einum barni, sum ynskja okkurt at búgva í. Alt hevur áhuga, eisini nærhendis hesum støðum.
Tlf. +45 75470735 Esbjerg

HØLI YNSKIST TIL LEIGU
Skal brúkast til tónleikavirksemi, venjing og undirvising.
Tlf. 226242

MINNI HØLI
Eitt minni høli vælegnað til goymslu ella minni smiðju til leigu á havnalagnum í Kollafirði. Liggur vael fyri.
Tlf. 421372

SUMMARHÚS TIL LEIGU
Nýtt stórt summarhús í Dronningmølle á Norðursælandi. Allir hentleikar, 20 min. at koyra til Nordsjællands sommerpark + vatnland – ca. 1 tími til Tivoli, 2 km, til bestu baðistrond. vælegnað til 2 fam. Verður útleigað frá 10. mai til 27. juni.
Tlf. 455835

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt par við einum barni, sum søkja íbúð á Skálafjørðinum skjótast gjørligt. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 269329

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Klaksvík til eitt par við einum barni. Alt hevur áhuga. Vita tit nakað, so ring vinarliga á
tlf. 506773

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes E-postur: debes@post.olivant.fo
Tlf. 311197

Dýr

KETTA FUNNIN
Vit hava funnið eina kettu ið er reyð og oyruni eru markað. Um tað er nakar, ið saknar hana, so vinarliga ring
tlf. 310463

HESTUR TIL SØLU
6 ára gamal íslendskur hestur til sølu.
Tlf. 25 72 04

HEY HEY!
Tíkarlilja hevur lagt 4 fittar kettlingar. 3 frensar, ein er reyður, 2 gráir og ein løða ið er reyð/grá. Vilt tú hava ein, so eru teir klárir at flyta heimanífrá um 6 vikur.
Tlf. 226517

HVØLPAR
5 vikur gamlir, verða latnir til djóravin um uml. 2 vikur. Mamman er Border Collie.
Tlf. 458020 ella 226383

TIL SØLU
Akvarium uml 30 litrar við hitalikami og borði at standa á til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 255279

DVØRGAHAMSTRARABÚR
selist fyri bert 250 kr.
Tlf. 316552 ella 316552

DVØRGHAMSTRARAUNGAR
5 dvørghamstraraungar til sølu fyri 60 kr. Teir eru 7 vikur og sera fittir. Um tú hevur áhuga, so ring á
Tlf. 423544 ella 508010 Elsa

SERA FITTUR KETTLINGUR
Sera fittur og penur ljósabrúnur og hvítur kettlingur (frensur) kann avheintast av fólki, sum eru góð við djór, er reinligur.
Vinarliga ring tlf. 455412 ella 267403

KETTLINGAR
3 sera fittir kettlingar, svartir við hvítari bringu kunnu avheintast.
Tlf. 311319 ella 223703

Fundir

AÐALFUNDUR
Aðalfundur hjá Vágs Sóknar Bygdasavni og Vágs Sóknar Fornminnisfelag verður í Stóra Pakkhús ónskvøldið 16. apríl 2003 kl. 19.00. Skrá sambært lógum f elagsins.
Vágs Søknar Bygdasavn og Vágs Søknar Fornminnisfel

ELDRAFELAGIÐ NÓN
Vit koma saman í Hæddini týskvøldið 8. apríl kl. 19.30. Nýggir limir eru vælkomnir við.
Eldrafelagið Nón, Saltangará

Húsarhaldstól

TIL SØLU
3 ára gamalt Ignis køli- og frystiskáp til sølu. Sær út sum nýtt.
Tlf. 361168

ELECTROLUX
breyðmixari til sølu fyri 800,- kr.
Tlf. 266282

ZANUSSI
ZFE 821X vaskimaskina í góðum standi, biliga til sølu.
Tlf. 260666

KØLI/FRYSTISKÁP
85x60x60. Vegna flyting selja vit okkara nýggja (7 mór) køli/frystiskáp 3.000,-
Tlf. 310531 ella 222768

RUNT VASK
Eitt runt vask 40 cm. við bakka fæst við at avheinta tað.
Tlf. 316753

FRYSTIBOKS
Nýggj GRAM frystiboks til sølu fyri 4.000,- kr. Nýprísur kr. 5.000,-
Tlf. 314343

Innbúgv

TIL SØLU
Maghogni reol 3 sekt. v/ ljós. Nýprísur kr. 23.000,- selist fyri kr. 6.000,-
Tlf. 223527

TIL SØLU
Nýggj dupult sovisofa selist vegna plásstrot.
Tlf. 447342

DUPULT SOVISOFA
Ein góð dupult stór sovisofa til sølu fyri kr. 3.000,- Kostaði kr. 5.000,- (nýggj).
Tlf. 319394 seinnapart

HORNASKÁP
avsýrað eik, hondgjørdur glasrútur ovast við ljós. Skáp niðast, til sølu vegna plásstrot fyri 3000 kr.
Tlf. 319915 ella 266575

YNSKIST
Fult dempað vatnsong ynskist til keyps.
Tlf. 260181

ETAGUSONG
Etagusong ynskist.
Tel. 510101

HVÍTT KØKSBORÐ
við trækantum + eyka pláta 400 kr. Ljóst træ sofaborð 400 kr.
Tlf. 319806

BETREKK TIL SØLU
Beige-litað betrekk til sofu 3+2+1 til sølu.
Tlf. 449414 ella 218090

OVALT SPÍSIBORÐ
úr marmor v/ jarnfóti 180 x 110 cm. biliga til sølu.
Tlf. 260038

SKRIVARABORÐ
Gamalt málað skrivaraborð til sølu. Kann avsýrast til sølu fyri 2.500,-
Tlf. 310531 ella 222768

TRAPPA
Vegna umbygging selja vit eina trappu við platti, væl viðfarin fyri 8.000 kr.
Tlf. 423342 ella 216042

Matur

DUNNUR TIL SØLU
10 dunnur, 9 mán. gamlar og 4 steggjar, verða seldar fyri einans 1.500 kr. allar 14.
Tlf. 252897

Pløgg

FØROYSKUR MANNFÓLKABÚNI
til sølu. Svartur vestur, svørt troyggja við knappum, svartur buksur við knappum, brúnt kot, tvær føroyskar húgvur (ein reyð og ein blá) og hosubond. Klæðini eru ca. str. medium og ikki nógv brúkt. Klæðini eru til sølu fyri 6500,- kr.
Tlf. 0045 74420518/004522729178 ella 733278 eftir

STIMI
Nýggjur stimi bíliga til sølu. (havi nummarvísara, so eg kann ringja aftur). Ringi fyrrapart frá kl. 9.00 til 11.00 og um kvøldið eftir kl. 22
Tlf. 318096

KLÆDNINGUR
Ein svartur Van Gils klædningur, sum er brúktur eina ferð, er biliga til sølu. Stødd: jakkin 44-34R-44 (S) Buksurnar 46-36R-46 (S).
Tlf. 260038

Samband

SAMBAND
Kvinna 63 ár ynskir samband við ein góðan og trúfastan mann. Skriva til Sosialin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk 561/3

SAMBAND YNSKIST
Eg eri 61 ára gamal maður, sum fegin vil koma í samband við eina kvinnu. Eg drekki ikki. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 560

KVINNA SØKIR SAMBAND
Kvinna, síðst í 60-unum, ynskir samband við mann í passandi aldri, skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill.mrk. 378c

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður á Strondum sunnudagin 6. apríl kl. 18. Leikarar millum 4 tey bestu þørini fáa steyp til ognar.
Strálan

Súkklur

TIL SØLU
Derbi predator gráur/orange skutari, knapt 3 ára gamal.
Tlf. 220896

DAMUSÚKKLA
til sølu fyri 500,- kr. Krevur ábótur.
Tlf. 266282

APRILIA RX50
4 mór. gomul, koyrt uml. 3.000 km. Nakrir lutir fylgja við. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 251820

ER TAÐ NAKAR
ið kann selja mær eina 2 hjólasúkklu við hjálparhjólum. nr. 14 ella 16.
Tlf. 318822

FJALLASÚKKLA TIL SØLU
Ein fjallasúkkla við 12 gearum, treingir til smáar ábótur. Biliga til sølu.
Tlf. 252623

TIL SØLU
1 gentusúkkla 8 ár, lítið brúkt fyri 700,- og 1 gentusúkkla 5 ár fyri 200,- og ein 3-hjóla súkkla, lítið brúkt fyri 500,-
Tlf. 213060

Teldur

PLAYSTATION TIL SØLU
Ein playstation til sølu. Tvey joystikk og eitt memorycard fylgja við. Spøl, m.a. Starwars, Toy Story 2, Jurassic Park, Metalgear eisini til sølu.
Tlf. 317453 ella 257245

TELDA TIL SØLU
AMD 1600+, G-Force 4 MX 440 128 Mb, 80 Gb Hardisk, Cd-rom, DVD-rom, cd brennari, netkort og modem, 384 Mb SDram, við skermi, hátalarum, optiskari mús, og tastaturi til sølu fyri 12500 kr.
Tlf . 32876880 ella E-mail: andreas@bil.fo (Danmar

PROCESSARI TIL SØLU
Ein AMD Athlon Thoroughbred XP 2100+ (1733MHz). FSB: 266MHz. Socket A til sølu fyri 999 kr
Tlf. 313471

SPØL TIL X-BOX TIL SØLU
Blade II og Project Gotham Racing. Prísurin er 200 kr. stk.
Tlf. 428167

DVD-FILMAR
Disney »Dinosaur« kr. 175. Disney/Pixar »Toy Story 2« kr. 175. Báðir fyri kr. 300.
Tel. 510101

TELDA TIL SØLU
AMD Athlon 1.3 GHz, 256 Mb Ram, GeForce 4 TI 4200, harddiskar við 20 GB (7200 rpm) 17" skermur v.m. Prísur 7.000 kr.
Tlf. 319806

ZITECH TELDA TIL SØLU
350 MHz, 10 G, 64 MH Ram, DVD-rom + cd-brennara. 3.000,- kr.
Tlf. 311149

TELDUBORÐ
Nýtt telduborð til sølu fyri 500,- kr.
Tlf. 262271

GÓÐ TELDA TIL SØLU
AMD Athlon 1200 MHz, 256 Mb Ram, gott grafikkort, 2 brennarar, bubble jet printari, ym. spøl o.a. 15" skermur. Prísur 5.500,-
Tlf. 316817 ella 516817

NÝGGJ FARTELDA
Intel celeron 1700MHz, 256MB DDR Ram, 14,1" TFT, 20GB Hardisk, 24X CD 8X DVD 8X CDRW, Modem 56kbps, Netkort 10/100Mbit, fartelda, taska og spøl sum: Championship manager 4, FIFA 2003 og nakrir filmar sum: Gangs of New York og Catch me if you can, til sølu fyri 12.000,-
Tlf. 60679949

NINTENDO 64
Er tað nakar sum eigur spælið »Lego Racers« og eitt memorycard at selja okkum, so ring
Tlf. 316552

TELDA TIL SØLU
AMD Athlon XP 2000 + (1667 MHz) ASUS A7N266-E Motherboard við innbygdum Geforce 2 (PC2100) RAM, 60 GB IBM Harddiskur, Geforce 4 Ti4600 128 MB RAM, DVD Drev, 24 x Plextor brennari og ein 19" skermur 11.000 kr. Spyr um Windows og programmir.E-mail: gunnarhentze@hotmail.com
Tlf. 256797, 314835 ella 314846

TIL SØLU
Telda við skermi, mús, hátalarum, tastaturi og modemi til sølu fyri uml. 3.000 kr. Góð til m.a. skúlabrúk. Ring
Tlf. 310055 ella 250118

TIL SØLU
Telda við skermi, mús, hátalarum, tastaturi og modemi til sølu fyri uml. 3.000,- Windows 2000 og Office er í telduni. Góð til m.a. skúlabrúk.
Tlf. 310055 ella 250118

TIL SØLU
4x-box spøl til sølu. Øll spølini eru undir 1 mór. gomul, til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 316212

PLAYSTATION I TIL SØLU
við 1 joystik, memorycard, 13 spøl, FIFA 2001-2002, James Bond, Driver 2, Medievil 1,2, The grinch… Prísur 1.000 kr.
Tlf. 264704

Tónleikur

TRUMMUR TIL SØLU
Pearl trummusett, hálvtannað ára gamalt, lítið brúkt og í sera góðum standi.
Áhugaði kunnu ringja 255866 ella 456773

EL-KLAVER
Lítið brúkt el-klaver til sølu.
Tlf. 456129 ella 216129

BILSTEREO VIÐ FLØGUBOKS
Pioneer CD-spælari við fløguboks til 6 fløgur biliga til sølu.
Tlf. 318460

TRUMMUSETT
Eitt trummusett til sølu.
Tlf. 448694 ella 508436

HYGG HER!
Dámar tær harðan tungan rocktónleik er hetta akkurát nakað fyri teg. Vit søkja eftir trummuspælara og guitaristi til ein rockbólk.
Tlf. 316422 ella 506018, Jákup Eli

KORG 01/WFD
Music Workstation A1 Synthesis System Wave Sampling. Variable Digital Filter. Multi Digital Effector, 16 Track Sequencer 3,5/nc 2DD FOD. Selist fyri 9.000,-
Tlf. 456072 ella 251554

Út- & Sjónvarp

DIG. PARABOL MÓTTAKARI
Ein Strong digitalur móttakari + canal modul til sølu fyri 3.000 kr. Verður eisini selt hvør sær.
Tlf. 554564

YNSKIST
Ein analog móttakari til parabol ynskist til keyps.
Tlf. 223527

VINDEYGA TIL SØLU
1 brúkt vindeyga br. 110 x h. 120 til sølu.
Tlf. 447342

TIL SØLU
eru 2 stk. 0,3 db parabolhøvd, sum fær ein 1.2 m. parabol at virka sum ein 1.8 m. Allar kanalir koma fram á 1 grad V og tær flestu á 5 gradir E.
Tlf. 314433

LEIGA SJÓNVARP
Vit hava sjónvarp, video og kamera til leigu fyri sámuligan pris.
Radioverkstaðurin, Mannbrekka 1, tlf. 319544

BILRADIO VIÐ FLØGUSPÆLARA
1 ára gamalt til sølu. Nýprísur 3.400 kr. nú 1.500,-
Ringið tlf. 316279 ella 516279

RADIO YNSKIST
Hevur nakar eitt radio frá 1970 árunum at selja mær, so ring vinarliga
tlf. 319613

Ymiskt

UNGMANNAFELAGIÐ KELDAN, SKÁLAVÍK
Sandoyarstevnan verður á Keldu vikuskifti 18., 19. og 20. juli.
Nevndin

TIL SØLU
Radiatorur 30x75. Hurð b. 55 cm. Vask, Bilbarnastólur.
Tlf. 443056 ella 213313

H-VINDEYGU TIL SØLU
4 stk. nýggj H-vindeygu 128,8 x 118,8 cm. til sølu við loddrøttum sprossa. 2 stk. av vindeygunum hava loddrættan sprossa á vinstru síðu og 2 stk. vindeygu hava loddrættan sprossa á hoguru síðu.
Tlf. 456017 ella 216121

FRÁ FØROYA AKVARIUFELAG
Loppumarknaður verður á gongugøtuni 3. mai. Um onkur hevur hug at lata nakrar lutir eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum á
tlf. 213232 ella 504805

KØLIREOL
br. 2.5 m. hædd 2 m. við leysum kompressara biliga til sølu.
Tlf. 315528

FRYSTIBOKS
við glasloki biliga til sølu.
Tlf. 315528

SAMLAÐ AVHEINTINGARTILBOÐ
Ein wc-kumma, eitt baðikar, eitt vask, ein brúsikabina. Liturin er karry myrkagulur.
Tlf. 318914

BRENNIOVNIR TIL SØLU
Ein stórur brenniovnur, 100x65x50, sum hitar upp til uml. 80 fermetrar, biliga til sølu.
Tlf. 319601

APEX FERÐASEÐIL
Eigur onkur ein Apex ferðaseðil at selja mær eitt sindur bíligari.
Ring 316371 ella 216371

NOKIA 3330
við 7 coverum + eina tasku til sølu fyri 1400 kr.
Tlf. 250908 Kári

HEY!
Hava tit klæðir, bøkur, møblar ella onnur brúksting, ið tit vilja sleppa av við, vilja vit fegin avheinta tað. Í Vágum tlf. 255669 í Havn tlf. 267704
02.b

TIL SØLU
Ein góð elektrisk skrivimaskina til sølu Carrera II.
Tlf. 252623

TIL SØLU
Saðil 15" og boksl str. Full til sølu fyri 2.200,- Nýprísur 3.700,- Lítið brúkt.
Tlf. 458020 ella 226383

ANTIKVITETER SÆLGES BILLIGT
Grundet kommende flytning bl.a. afsyrede møbler, blik dåser, petroleumslamper, billeder, kikkerter. Rich's samlealbum og meget andet.
Tlf. 319194 ella 257246

ATGONGUMERKI TIL FINALUNA
Tvey atgongumerki til finaluna »stjerne for en aften« til sølu. Kostnaður 390 pr. stk. Tað ber til at fáa tey antin í DK ella í FO.
Ring 224655 - Karina

NOKIA 3210
fartelefon við loðara 500,- kr.
Tlf: 442181

MODELBÁTUR
til sølu. Bátarin er heimagjørdur. Ein elmotorur fylgir við. Prísin kunnu vit tosa um.
Tlf. 251439

TIL SØLU
Innhurð v/karmi, 0,77 x 2.10 m, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 219994

YNSKIST
Kølibox 12 V skal brúkast í bili, ynskist til keyps.
Tlf. 219125

TIL SØLU
Arbeiðsprojektørur 1000W til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 443402

YNSKIST
Er tað nakar, sum hevur ein Apex flogferðaseðil Keypmannahavn og aftur biliga til sølu.
Tlf. 312762 aftaná kl. 15

KIOSK INVENTAR
biliga til sølu: Hillar, stativ, frystiboks, køldiskar.
Tlf. 447579

NÝGGJ FARTELEFON
Nokia 6100. Fartelefonin hevur ikki verið í brúk. Til sølu fyri 3100 kr.
Tlf. 60679949

MYNDATÓL TIL SØLU
1 1/2 ára gamal Minolta Dynax 500si kassi til sølu fyri 1800 kr. 1 ára gamalt Minolta 3500 xi blitz til sølu fyri 1500 kr. 1 ára gomul Tamron 28-300 mm. aspherisk linsa. til sølu fyri 5000 kr. Samlað til sølu fyri einans 7500 kr., nýprísur 13000 kr.
Tlf. 260590

MÁLNINGAR TIL SØLU
Kalsoyarfjørður, Borðoyanes, Borðoyavík, Múli og Skúvoy til sølu til hægstbjóðandi.
Tlf. 269909

VIDEOUPPTØKUTÓL TIL SØLU
Videoupptøkutól til sølu. Canon V60 Hi8, 2,5" LCD litskermur, 22x optiskt og 800x digitalt zoom, TimeBase korreksjón, Y/C litbetring, Programmeringsmøguleikar. Digitalar effektir, Brúkar lítlan streym, Eyka battari. Taska til videokamera, Prísuppskot: 3500,- kr. (Nýprísur 5000,- kr. august 2002)
Ring til 322120

PENSIONISTAFELAGIÐ »HUGNI« Í KLAKSVÍK
Vit gera útferð í Vágarnar. Farið verður fríggjadagin 23. mai og koma aftur 26. mai. Búgva á Hotel Vágar. Sigið frá áðrenn 1. mai á
tlf. 455208 ella 455440

FRIENDTEX KATALOGIÐ
er komið og kann heintast á hesum stoðum.
Hanna,
Undir Fossum 46,
700 Klaksvík.
Tlf. 456827 opið: mán-frí 17-19.
Leygardag 10-14, annars eftir avtalu, tlf. 216827,
Marjun,
Rættarvegur 2,
420 Hósvík,
tlf. 422772, fartlf. 268052. Opið: mán-frí 16-19, annars eftir avtalu.
Tlf. 456827 - tlf. 422772

TILTØK

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Gud og fyrigeving. Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

Hebron, Argir
Friggjakvøldið kl. 20 Bønar- og lovsangsløta.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og møti, Suni S. Jacobsen talar um evnið »Kristus okkara fyrimynd – sum húshaldari«. heimasíða www.hebron.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Í kvøld kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta við konfirmatión, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Jens Garnfeldt, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Vón fyri framman.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin (missiónsmøti).
www.filadelfia.fo

Samkoman Lívdin
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómstiltak, Regin Guttesen talar um evni: »Samkynd, Biblian og samkoman«.
Sunnumorgunin familjumøti kl. 10.30 evnið er: Hvat segði Jesus um bøn? og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 er evnið: 1. Korint kap. 13-14 – Náðigávurnar 2, á báðum møtunum talar Jógvan Zachariasen.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 19.30 úti á Fløtum. Jan Zachariasen greiðir frá rbeiði sínum á deyvabíbilskúvoy í Ungar.
Heimasíðan www.livdin.fo

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Mikukvøldið kl 20 Bønarmøti í Rhema.
Fríggjakvøldið kl 20 byrja møtini við Jens Garnfeldt úr Danmark.
Leygarkvøldið kl 20 møti í Rhema við Jens Garnfeldt.
Sunnudagin onki møti í Rhema vegna møtini við Jens Garnfeldt í Filadelfia kl. 11 og í Evangeliihúsinum kl 18. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Vikuskiftismøti fríggjadagin kl. 20 og leygardagin kl. 20, drekkamunnur aftaná.
Sunnudagin kl. 11 og 17 Suðuroyingar tala, syngja og vitna. Øll eru vækomin.
Sunnudagsskúli kl. 14. Á páskum fáa vit vitjan av Major Knut og Inger Ytterdal úr Noregi.

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Christian Martin Christiansen.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdag kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taize) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa og barnadópur í Mariukirkjuni.
Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagsskúli kl. 14.

Ebenezer
Í kvøld kl. 20 heldur møtirøðin fram við evninum: At tæna og hjálpa 1. Tessalonikubrævi.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møtirøðin við evninum: At tæna og hjálpa 1. Tessalonikubrævi, kl. 21 Útimøti.
Talari á møtirøðini verður Poul Færø.
www.ebenezer.fo

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Fríggjadagin 4. til sunnudagin 6. apríl: Várgleði lega.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

Vikuskiftismøtir við Jens Garnfeldt
Felagsmøtir verða við Jens Garnfeldt úr Danmark hesar tíðir: Fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl 20 í Rhema.
Sunnumorgunin kl 11 í Filadelfia, sunnukvøldið kl 18 í Evangeliihúsinum.
Øll eru vælkomin.

Glæman í Kvívík
Vikuskiftismøti verður fríggjakvøldið kl. 19 við ungdómi av Skála.
Leygarkvøldið kl. 19 við Rannvá og Eiler Royðitoft av Strondum og sunnukvøldið kl. 19 við Regin Høgnesen og sangbólkurin Gittit syngur.

Saron, Vestmanna
Í kvøld kl. 19 byrjar ungdómslegan. Happy Weekend við luttøku úr Evangeliihúsinum.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, Jón Miðberg talar.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti hjá Kristin og Gyndu Johansen.
Telefonandaktin 424741.

Nebo Toftir
Sangfundur við Siloakórinum verður á Svangaskarði sunnudagin kl. 18.00.

Páskastevnan á Skála 2003
Keldan skipar fyri páskastevnu, har vitjan verður m.a. úr Noreg. Eisini verða heimligar kreftir við.
Ungdómskvøld og Syng við møti verða eisini á skránni.

Elim í Søldarfirði
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18 talar Philip Muinde. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Blái Krossur Føroya
Í samband við aðalfundin í Mienigheitshúsinum á Skála um vikuskifti, verður bíbliutími leygarmorgunin kl. 11 v/ Thominu Davidsen, kl. 14 verður aðalfundur, kl. 16 verkætlanin »Børn í vanda« v/ Tórhild Bjarkhamar og kl. 20 Ungdómsmøti, ið BKU skipar fyri.
Sunnudagin kl. 14.30 verður familjumøti v/ Jónu Thomsen, kl. 16.30 Bíbliutími v/ Alfred Olsen, kl. 19 Hugnalig samvera har Sverri Kass talar.

Keldan
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Odu, Duritu og Lindu.
Sunnukvøldið kl. 17 Møti við Martin Olsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.

Eiði
Vármøtini halda fram í kvøld kl. 20 v/ Emil Olsen, presti. Jóhanna, Hallgerð og Marita syngja. Bønarløta verður kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Lívsins Orð
Sunnudagin kl. 17 Møti við Palla Højgaard.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 11 Barnarbeiði (3) 4 til 6 ár, kl. 14 Barnaarbeiði 1., 2. og 3. flokkur, kl. 16 Barnaarbeiði 4., 5. og 6. flokkur.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Verið hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og Lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sands missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Hermon, Norðdepli
Fundarrøðin, har talað verður um afturkomu Jesusar, heldur fram. Í kvøld verður evnið »Profetiska ætlan Guds 2« – tættir úr Gamla Testamenti. Jógvan Páll Sevdal og Svenning av Lofti tala. Magnus Poulsen, Erland Fredericksberg, Bjørn Simonsen o.a. spæla og syngja.

Betesda, Klaksvík
Leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 verður evangel. fundur, har Levi Joensen og aðrir tala.
Manskvartettin og sangkórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Onki ungdómsmøti er fríggjakvøldið.
Leygarkvøldið kl. 20 Hugnakvøld har Gladys á Kósini og onnur syngja, félagssangur og drekkamuður.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við Poul Nicolai Stenberg. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarmorgunin kl. 10 Undirvísing um depression v/ Birgit Tind.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús. Team úr Kolding luttekur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Team úr Kolding luttekur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Karl og Katrinu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Porkeri
Kvinnumøti verður leygardagin kl. 16. M.o. luttaka Elsa í Skorini, Anna Maria Joensen og Jona Nielsen. Anja Hansen syngur. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Felagsmøti fyri Vág, Porkeri, Hov og Sumba við Terja og Hallur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

Frá Randers
Føroyskt møti verður í »Saron«, St. Blichersgade 1C, sunnudagin 6. apríl kl. 15.30, v/ Hera Elttor, trúboðara.
Eisini verður hugnalig samvera við kaffi o.ø. Høvi verður at geva eina gávu til arbeiðið. Allir føroyingar eru hjartaliga vælkomnir.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Tilhaldið í Sandoynni
Opið er mánadag og mikudag frá kl. 14-17 í missiónshúsinum á Sandi. Drekkamunnur er at fáa báðar dagarnar.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadagfríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

KONFIRMATIÓN

Konfirmantar í Vesturkirkjuni 6. apríl 2003

Ólavur Danielsen, Velbastaðvegur 50
Hjal